## Kaká er ein frálík vøra

Tað er framvegis ikki greitt, hvat nummar Kaká skal hava á rygginum í síni komandi tíð í Real Madrid. Men hóast tað, so aftra fjepparanir seg ikki við at keypa troyggjurnar við navninum hjá brasiliumanninum á rygginum. Spanska blaðið Marca skrivar í dag, at felagið longu hevur selt fleiri enn 2000 troyggjur, har bara navnið hjá Kaká er á rygginum.



## Backe varð vístur aftur

Sviin Hans Backe verður ikki høvuðsvenjari í enskum felagi á hesum sinni. Hann er seinasti vikuna settur í samband við venjarastarvið í West Bromvich Albion, men í gjár varð greitt, at hann ikki fær starvið. Backe stóð frá 1998 til 2000 á odda fyri AaB, og frá 2001 til 2005 var hann høvuðsvenjari hjá FC Keypmannahavn.



Hóast tapið móti Grønlandi kostaði dýrt, so er eingin ivi um, at føroyska borðtennislandsliðið hevur eina bjarta framtíð
Mynd: Álvur Haraldsen

## FØROYAR Á ODDA

Nú tveir dagar av Oyggjaleikunum 2009 eru lagdir aftur um bak, eru Føroyar á odda í samlaða heiðursmerkjabýtinum.

Gullið, sum badminton-liðið vann í gjár, var tað sjeynda hjá okkum á leikunum higartil. Hini seks gullmerkini, sum Føroyar hava vunnið, eru, Búgvi Poulsen og Skarpheðin Njálsson í judo og so tey fýra gullmerkini, sum vórðu fingin til høldar í svimjihylinum í gjár. Her vunnu Pál Joensen, Katarina S. Lamhauge og tær báðar stafettirnar í 4X50 metra blandaðari svimjing.

**Heiðursmerkjabýtið**

| | Land | gull | silvur | bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Føroyar | 7 | 7 | 9 |
| 2 | Áland | 6 | 5 | 7 |
| 3 | Gotland | 5 | 3 | 3 |
| 4 | Jersey | 4 | 7 | 3 |
| 5 | Isle of Man | 4 | 6 | 5 |
| 6 | Guernsey | 4 | 4 | 6 |
| 7 | Cayman | 3 | 3 | 1 |
| 8 | Rhodos | 3 | 2 | 2 |
| 9 | Isle of Wight | 3 | 1 | 2 |
| 10 | Saaremaa | 2 | 3 | 3 |

# Heiðursmerki um tvey ár

**Bert 20 ára gamli Ragnar Egilsson er veteranurin á føroyska borðtennislandsliðnum, sum hóast frágongd av sterkasta profilinum var sera nær heiðursmerkjum í liðkappingini**




Jákup Mørk

Tað gekk, sum roknast kundi við í borðtenniskappingini hjá føroyska landsliðnum.

Fyrsti dysturin í kappingini, sum var móti Grønlandi, var tann avgerandi fyri vónirnar um at spæla hálvfinalu. Vónin var, at Føroyar kundu fáa hjálp frá Isle of Man, men hetta hendi ikki, og so skal føroyska liðið til at spæla um plássini millum fimm og átta.

### Stór framgongd

Men talan er avgjørt ikki um nakað vónbrot fyri føroyska liðið. Talan hevur verið um eitt ættarliðsskifti, sum millum annað hevur viðført, at elsti spælarin á liðnum í dag er bara 20 ára gamli Ragnar Egilsson.

Og verður so sammett við 10. plássið, sum føroyska liðið fekk á Rhodos fyri tveimum árum síðani, meðan Kjartan Eli Hentze framvegis var á liðnum, so er eingin sum helst ivi um, at talan er um risa framstig, sum føroysku spælararnir hava gjørt seinnu árini.

- Talan er kanska um vantandi royndir, tí spælararnir eru ikki nóg úti í sterkum altjóða kappingum. Men tað er eingin ivi um, at hetta er framtíðin hjá okkum, og liðið hevur staðið seg avbera væl, sigur Petur Niclassen, sum ikki longur er aktivur innan fyri bandarnar, sum umgyrða borðtennisvøllin.

- Hesa ferð spæla vit so um plássini millum fimm og átta. Spælarar sum Ragner Egilsson og Fróði Fríðason Jensen hava veruliga traðkað í karakter, og hini hava eisini spælt væl,

Og vit síggja eisini, at nú standa vit okkum sera væl í bæði kvinnu- og mixdouble?

- Ja. Har vóru tað sera smáir marginalar, sum feldu okkum móti Grønlandi. Men soleiðis er tað í borðtennis. Tveir bóltar kunnu avgera alt.

Tveir bóltar og tvey ár afturat. Tosa vit so um heiðursmerki?

- Ja, hvør veit. Við hesum liðnum og tí, sum tey kunnu náa, so er heilt víst møguleiki fyri, at vit næstu ferð kunnu standa okkum enn betur, segði Petur Niclassen.

## FAKTA

**Borðtennisúrslitini**

| | |
|---|---|
| Grønland-Føroyar | 4-3 |
| Føroyar-Rhodos | 7-0 |
| Guernsey-Føroyar | 7-0 |
| Føroyar-Isle of Man | 7-0 |
| Føroyar-Hetland | 6-1 |



# Beint uttan fyri heiðursmerki

Føroysku skjúttarnir hingu væl við, men tað rakk ikki til heiðursmerki í liðkappingini í skeet.

Magni Dam og Jóannis Joensen mannaðu føroyska liðið, og frá byrjan løgdu teir seg í hølunum á Álandi, Isle of Man, Hetlandi og Cayman.

Tað eydnaðist tó ongan tíð at raka røttu runduna, sum kundi togað okkum upp á heiðursmerki, og tá eingin av hinum hevði hug at taka eina vánaliga rundu, vaks munurin frá okkara monnum og upp til heiðursmerkini.

Endaliga úrslitið gjørdist, at føroysku menninir skutu 163 dúgvur. Áland vann kappingina við 180 stigum. Isle of Man vann silvur, meðan Hetland og Cayman bæði endaðu á 170 dúgvum.

*-mørk*